# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bakkafrost eitt gott val

Sum ikki einaferð øll hesi seinastu 10 árini var spenningurin stórur, tá ársins virki varð kosið á Vinnudegnum fríggjadagin. Ikki tí at tað var so torført at gita, tí øll eygu hava leingi verið vend móti alivinnuni og flaggskipi tess, Bakkafrost. Hetta var so eisini okkara besta boð á hesum stað fyri knappari viku síðani.

Lat okkum alt fyri eitt ynskja Bakkafrost, starvsfólki, leiðslu og eigarum hjartaliga tillukku við heiðurinum. Tit hava uppiborið hetta og vónandi kann tað vera við til at stuðla upp undir tykkara arbeiði.

Tit eru ikki komin til búgvið borð, hóast virkið eisini hevur verið stuðlað av tí almenna eins og so mong onnur vinnuvirki eru tað. Bakkafrost hevur eina søgu, sum er gingin í arv frá einum undangonguættarliði til eitt annað, og vit vóna, at henda tradition fer at halda fram, so virkið framhaldandi fer at skapa arbeiði og økja um okkara útflutning.

Flestu av okkum minnast, hvussu alivinnan bráddliga gjørdist eitt nýtt íkast til búskapin, tá einstakir undangongumenn her ikki minst í Eysturoynni bróktu hugflog og dugnaskap til at leggja lunnar undir eina heilt nýggja vinnu. Við tógvið stríð og so sanniliga eisini stóran mótgang og byrjanartrupulleikar eitt nú orsakað av herviligum sjúkum eydnaðist tað kortini alifólkunum at koma uppundan aftur eftir eina kreppu fyri og aðrari eftir. Við at taka við læru av mistøkum og grátigheit gjørdist alivinnan fyri bert fáum árum síðani eitt av álitinum í búskapinum. Og ein av týðandi aktørunumog kanska undangongufelagið hevur verið Bakkafrost, sum byrjaði í tí smáa og sum við stórum dugnasemi og treiskni hevur ment seg til eina av landsins stóru fiskivinnufyritøkum. Og sum nú loksins hevur lagt saman við aðrari stórari alifyritøku við tí fyri eygað at verða skrásett á børsinum. Hóast mong eiga lut í hesi succes so vilja vit kortini her taka fram teir tríggjar, sum tóku ímóti heiðurslønini, Hans Jacobsen, Regin Jacobsen og Líggjas í Bø, allir tríggir veteranar á aliøkinum. Vit kunnu so bara seta okkara álít á, at tykkara fyritøka verður við til at menna hetta land við at virka á burðardyggum grundarlag.

Eisini ein heiðursløn varð latin sama dag fyri Ársins Átak. Tað var Matfestivalurin við Mortani í Hamrabyrgi, sum fekk hesa viðurkenningina og hjartaliga tillukku Mortan. Eins og Bakkafrostfólkini so er Mortan eisini ein fightari og við professionalismu í skjaldramerkinum. Gævið hesin heiður kann vera við til at menna mat- og drykkjumentanina her á landi. Í hesum sambandi vilja vit eisini nevna Leif Sørensen, sum við Gourmet matstovuni og tætta samstarvinum við Mortan hevur verið við til at fáa lív í nettupp umrøddu matmentan.

Loksins tillukku Vinnuhúsið við hesi 10. Vinnudegnum, sum vónandi kann stimbra vinnulívsfólki at halda fram við tí góða arbeiðinum. Men okkara ynski skal eisini vera, at vit í framtíðini fara at síggja fleiri vinnulívsfólk, sum hava dirvi og hegni til at menna aðrar vinnur umframt fiski- og alivinnurnar.

**Sosialurin**

## Ábyrgdarfólk valdast

BJARKI MOHR



**- Tá firtni vinnur á lutloysinum -**

Glantrileikurin seinastu dagarnar, leikstjórnaður av Magna Laksafoss og Edmund Joensen, hevur ikki tænt teimum, ella nøkrum øðrum, til nakran sóma. Hinvegin kann framferðin nýtast til at seta politisku ábyrgdarkensluna í perspektiv.

Búskaparligu rembingarnar, ið hava rakt heimin, eru ávegis, og partvíst komnar til Føroya. Fyrri tey, ið hava upplivað meira enn eina búskaparkreppu er tilvitað, at henda eisini leggur at landi í Føroyum, bert seinkað av sjóvarfallinum.

Eg fari ikki at endurgeva búskaparligar forsøgnir, tí hesar kunnu lesast av tølunum hjá Fíggjarmálaráðnum, Føroya Hagstovu og frágreiðing frá Tjóðbankanum. Vit kunnu eisini loyva okkum, at hugsa sjálvi.

Vit hava ymsikar hugsjónarligar atfinningar mótvegis sitandi samgonguleiðarum, Kaj Leo Johannesen, Jóannes Eidesgaard, og Jørgen Niclasen. Vit sleppa tó ikki undan, at hesir standa framman fyri einari stórari avbjóðing, ið ikki loyvur teimum at taka einstøk persónlig atlit, um teir skulu verða sína ábyrgd vaksnir.

Tað er tí lætt keypt atgongumerkið teir báðir sambandsmennirnir, búskaparfrøðingurin og fólkatingslimurin borreiða við.

Búskaparfrøðingurin kennir seg útifrystan av sínum egnu, tí hansara hugsunarháttur ikki vinnur neyðugan frama. Er tað kanska persónliga eginleika hansara at samtarva, ið bilar, tá brúk er fyri hesum?

Fáu mánaðirnir í Fíggjarmálaráðnum hava óiva givið Magna Laksafoss eina ballast. Tíðin var tó so stutt, at hann neyvan kann hava patent upp á búskaparliga sannleikan. Enn er tað mest teoretiskar vendingar vit hoyra upp í saman, og sum skaldið skrivaði, "tað lekur millum teori og praksis".

Fólkatingslimurin spælir upp á allar tangentarnar, so langt hann sleppur. Man kann eisini yvirspæla sín leiklut, og framstendur hann tí, sum ein firtin maður, heldur enn ein ábyrgdarfullur politikkari.

Edmund Joensen hevur eitt langt lív í politikki. Nógv ár á Føroya Løgtingi, fyrrverandi formaður í Sambandsflokkinum, fyrrverandi Føroya Løgmaður í stutt tíðarskeið, og umboðar nú Føroyar á danska Fólkatingi.

Her er talan um eina merkisverduga samanrenning millum ein yngri og ein eldri politikkara í sama flokki, ið báðir kenna seg forfjónaðar, tó av ymiskum orsøkum.

Hesir hava sett sær fyri at nýta alla sína orku at sáa iva um landsins leiðslu, herundir egnan formann, Føroya Løgmann. Fyri okkum, ið hyggja frá síðulinjuni kennist tað sum um, teir nýta orkuna skeivt.

Samgonguleiðararnir hava allir givið til kennar, og tí eisini ásanna, at tað finnast ongar lættar loysnir. Tað er ein virðilig ásannan, undir verandi umstøðum.

Tað er ein ofta brúkt, og lætt keypt eksponering, at skjóta breitt, og so vóna at boðskapurin talar til flest hjørtu. Vónandi eru føroyingar so tilvitaðir, at hesin háttur ikki vinnur frama.

Somu menn, ið talaðu fyri einum valdømi, so avgerðirnar skuldu tæna heildini, royna nú at taka broddin av landsins leiðslu, tá hesir leggja seg eftir at sigla samfelagið ígjøgnum eina hóttandi búskaparkreppu. Tað er lítið ábyrgdarfult.

Teir kundu eisini valt at nýtt orkuna uppbyggjandi, soleiðis at unga framskygni og eldru royndirnar komu øllum samfelagnum til gagns.

Uppbyggjandi leiklutin fremja teir ikki við at fara eftir nýkosna Føroya Løgmanni, ið hevur megnað savnandi leiklutin undir truplum umstøðum. Hann hevur víst teir persónligu eginleikar, teimum vantar.

Teir skjóta breitt, og royna við hesum eisini at raka fíggjarmálaráðharran, Jóannes Eidesgaard.

Orsøkin er tó yvasom, annar teirra, tí leikluturin sum fyrrverandi Føroya Løgmaður ikki spældi væl av. Hin, tí hann - í ovfarakáti - kennir seg hava betri førleika enn verandi fíggjarmálaráðharrin. Høglini eru spilt, tí verandi fíggjarmálaráðharri letur seg ikki ávirka stórvegis. Nógvu royndirnar koma honum til góðar. Her stendur førleiki og viðtøkuføri teirra ikki mát.

Jørgen Niclasen er eisini partur av landsins leiðslu, men her raka høglini ikki. Jørgen sleppur stórt sæð snikkaleysur frá álopunum, og kunnu vit bert undrast á, hví so er. Kanska tí at motivini eru persónlig, og Jørgen er ikki partur av hesum.

Um tit báðir skulu gera nakran gagn fyri samfelagið, og soleiðis gagnnýta tað álit veljarin hevur givið tykkum, mugu tit leggja á annan bógv. Gamaní er tykkum loyvt at vera ósamdir við einstøk mál í samgonguskjalinum, men varð tað ikki betri at tit loystu ósemjuna innanveggja.

Frá síðulinjuni kennist tað, sum um tykkara orsøkir eru persónligar. Leiðsla snýr seg um at vísa atgerðarmátt, tá mest er brúk fyri hesum. Tað gera tit best við at vísa ábyrgd, og taka lut í loysnunum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.